Álit

í

løgtingsmáli nr. 103/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu (Broyta áseting um rúsevnakoyring og møguleikan at avgreiða mál við fráboðan)

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, løgtingskvinna, hevur lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð tann 21. mars 2024 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 10., 22. og 29. apríl 2024.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Ráðið fyri Ferðslutrygd, Pál Weihe, professara í fólkaheilsu, Føroya Politi og landsstýrismannin í fiskivinnu- og samferðslumálum, Dennis Holm.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Erhard Joensen, Eyðdis Hartmann Niclasen, Árni Skaale og Jørgen Niclasen) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið hevur tvinni endamál. At hækka revsingina fyri at koyra ávirkað/ur av cannabis og at broyta ásetingina í ferðslulógini um at kunna avgreiða mál uttan rættarsókn, til eisini at galda fyri rúsevnakoyring, tá treytirnar til hesa mannagongd eru uppfyltar.

Galdandi ásetingar um koyring við evnum í blóðinum, sum ávirka tilvitið eru, at tann, sum koyrir ávirkaður, (minstamarkið), verður evsaður við einari sekt, sum svarar til hálva nettománaðarløn og treytaleysa frádøming av førararættinum í 6 mánaðir, óansæð hvussu stór nøgdin av rúsevnum í blóðinum er.

Hetta skal í framtíðini bert verða galdandi, um nøgdin av THC í blóðinum er upp til 0,001 mg/kg. blóð.

Eftir at hendan lógin er komin í gildi, verður revsingin fyri markvirðini omanfyri 0,001 mg/kg. blóð soljóðandi:

- Um nøgdin av THC er 0,003 mg ella hægri, skal revsingin herðast munandi til at vera frádøming av førararættinum í 3 ár og ein sekt uppá 1 netto mánaðarløn.

- Um nøgdin er júst 0,009 mg, verður revsingin at missa førararættin í 3 ár, umframt sekt uppá 2 netto mánaðarlønir.

- Um nøgdin av THC í blóðinum er hægri enn 0,009 mg, verður revsingin at missa førararættin í 3 ár, umframt 20 dagar hefti. Hetta svarar til galdandi revsing í ferðslulógini, tá talan er um promillu-koyring, tá promillan fer upp um 2,0.

Harumframt skal ein stigvís hækking kunna gerast í sektini, alt eftir hvussu nógv mg/THC er í blóðinum.

Ásetingin í § 58 g um at mál, sum ikki bera við sær hægri revsing enn sekt, ella tað fyriliggur eitt mál við spurningi um frádøming av koyrirættinum sambært ávísum ásetingum í lógini, kann avgreiðast uttan rættarsókn, um skuldsetti lýkur ávísar treytir, verður víðkað til eisini at fevna um brot á § 15 um rúsevni.

Eftir nevndarviðgerðina er meirilutin sannførdur um, at rúsevnakoyring veruliga er farin at vinda uppá seg, og at rúsevnakoyring er sera vandamikil fyri ferðslutrygdina, og at vit tí eiga at gera alt, vit kunnu, til tess at minka um møguleikan fyri, at fólk velja at koyra ávirkað av cannabis.

Meirilutin metir, at strangari revsing fyri at koyra ávirkaður av hesum evni, og at vit fáa markvirðini sett inn í lógina, fer at hava ein fyribyrgjandi virknað á valið at koyra ávirkaður.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Annika Olsen, Karlot Hergeirsson og Uni Holm Johannesen) hevur hesar viðmerkingar:

Í høvuðsheitinum er talan um eitt sera skilagott uppskot.

Tó so er talan um sera tekniskar broytingar, og tískil meta vit, at hesar broytingar eiga at verða gjørdar í aðalráðnum, so tær kunnu verða sendar til hoyringar og eftirkannaðar av Lógartænastuni, áðrenn tær verða settar í gildi.

Uppskotið, sum nú er í Vinnunevndini, hevur hvørki verið til hoyringar ella til eftirkanning hjá Lógartænastuni, soleiðis at slík lógaruppskot verða væl gjøgnumarbeidd. Harumframt er talan eisini um revsimál, og tá eiga slík mál at verða eftirkannað av Løgmálaráðnum, sum umsitur revsilógina.

Tískil verður mælt til, at aðaláðið ger eitt nýtt uppskot eftir vanligu mannagongdunum fyri lógaruppskot, sum síðani verður lagt fyri Løgtingið í heyst.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum til ikki at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 6. mai 2024

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstforkvinna	Eyðdis Hartmann Niclasen
Jørgen Niclasen	Árni Skaale	Uni Holm Johannesen
	Karlot Hergeirsson	